

**Rannvá Jacobsen rør við Jarnbardi, og situr á toftini í stýriborð:**

## Eyka uppsettar

Aftur í ár hevur seksmannafarið hjá kvinnumanningini á Jarnabardi hevja seg yvir alt og øll. Blái báturin hjá Knørrafelagnum úr Havn hevur vunnið allar róðrarnar seinastu tvey árini, og Vestanstevna gjørdist einki undantak.

Riddarin hevur verið harðasti kappingarneytin hjá Jarnbardi í ár, og hóast báturin var á heimasjógvi leygardagin, megnaði hann ikki at skala Jarnbard, sum endaði heili seks sekund frammanfyri Riddaran.

-Vit vóru eyka uppsettar í dag, tí Riddarin var á heimasjógvi. Tað gekk rættiliga gott hjá okkum í dag, og vit hildu allar avtalurnar, sigur ein brosandi Rannvá Jacobsen.

Leygardagin vann Rannvá sítt triðja meistaraheitið við Jarnbardi. Hon vann føroyameistaraheitið í 2002, 2004 og í ár 2005.

Spurd um Jarnbarndur hevur ætlanir um at taka sær av løttum til ólavsøku, nú føroyameistaraheitið longu er komið í hús, svarar Rannvá Jacobsen:

-Nei slett ikki. Vit halda fram við miðvísu venjingini til ólavsøku, tí tað er minst líka týdningarmikið at vinna á ólavsøku sum at vinna føroyameistaraheitið.

**.páll**




*Annað árið á rað kunnu kvinnurnar á Jarnbardi nú kalla seg føroyameistarar hjá seksmannaførum við kvinnum*

Mynd: Álvur

# Same procedure...

**Róðurin hjá seksmannaførum við kvinnum var sær sjálvum líkur á vestanstevnu. Bátarnir endaðu enn einaferð í somu raðfylgju, burtur sæð frá, at kvinnurnar á Gongurólvi, sum leygardagin róðu við Víkingi fingu fimta plássið og Sølmundur noyddist sostatt at taka til takkar við sættaplássinum**

SEKSMANNAFØR KVINNUR

*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

Undan róðrinum á vestanstevnu mundi lítil ivi vera um, at Jarnbardur fór at vinna. Kvinnurnar hava verið suverenar í so langa tíð nú, at alt annað enn ein sigur til tær tyktiskt nærum óhugsandi. Og varð eisini.

Á fjarðastevnu hevði Riddarin hug at hótta Jarnbard eitt sindur undir róðrinum, men á málinum var kortini ongin ivi um, hvør vann. Tí hildu summi, at Riddarin møguliga fór at gera ein vørr á heimasjógvi. Men kvinnurnar á Jarnbardi snøgt sagt vundu burtur úr Riddaranum og komu á mál tvær bátslongdir frammanfyri. Riddarin bardist eisini eina løtu um annað plássið við Lóm av Argjum. Tað stríðið vunnu miðvágskvinnurnar, men Jarnbard fingu tær onki gjørt við hendan dagin.

Nú er bara Ólavsøkuróðurin eftir, og tá eru Jarnbardakvinnurnar á heimasjógvi. Tað eru tvær vikur at venja í hjá manningunum, men lítið sannlíkt er, at úrslitið á Ólavsøku verður so ólíkt úrslitunum, sum tey hava verið alt árið hjá seksmannaførunum við kvinnum.

### 6 mannafør kvinnur

1 Jarnbardur 05:03.19
2 Riddarin 05:09.01
3 Lómur 05:15.09
4 Páll Fangi 05:17.21
5 Víkingur 05:25.04
6 Sølmundur 05:28.10

## Úrslit frá alvaróðrinum á Vestanstevnu 2005

### Dreingir

1 Havfrúgvin 02:30.04
2 Royndin Fríða 02:32.14
3 Fípan Fagra 02:33.06
4 Sílið 02:41.23
5 Dúgvan 02:50.11
6 Ritan 02:52.02

### Gentur

1 Firvaldur 02:36.09
2 Drekin 02:37.12
3 Dúgvan 02:41.21
4 Tekla 02:42.02
5 Royndin Fríða 02:42.18
6 Ørnin 02:43.02
7 Sílið 02:46.22
8 Hvassi 02:50.19
9 Ritan 02:53.14
10 Falkur 03:17.07







*Riddarin fekk onki gjørt við kvinnurnar á Jarnbardi í Miðvági. Tær endaðu tvær bátslongdir aftan fyri Jarnbard, tá avtornaði*

Mynd: Álvur